

# Oljuprísurin og partabrøv rapa í morgun

**Jógvan Hugo Gardar**

24.08.2015 - 09:51

Oljan.fo

Oljuprísurin heldur fram at lækka í morgun, og teir hava lagt tveir varðar afturum seg í morgun. Norðsjóvaroljan Brent lækkaði til 44,51 dollarar fyri fatið, og amerikanska lættoljan lækkaði til 39,45 dollarar fyri fatið. Fyri Brent er talan um lægsta prísin síðani fíggjarkreppuárið 2009.

Orsøkirnar til at prísurin heldur fram at lækka skulu vera fíggjarmarknaðurin í Kina sum er sera óstøðugur í morgun, samstundis sum framleiðslan av olju er munandi hægri enn tað sum verður brúkt.

Tað er ikki bara oljuprísurin sum lækkar, eisini á keypsskalunum um allan heim koma boð um blóðreyð tøl. Oslo Børs, har bæði Atlantic Petroleum og Bakkafrost eru skrásett, er í morgun minkaður við fimm prosentum í virvi. Bakkafrost er lækka knøpp fýra prosent, og verður í dag selt fyri umleið 220 norskar krónur. Atlantic Petroleum-partabrøv eru ikki seld í morgun, men hjá teimum liggur seinasti søluprísurin um 25 krónur fyri partabrævið